gult cyan magenta svart



# út at koyra



## Mitsubishi og Daimler-Chrysler

Daimler-Chrysler hava gjørt eina avtalu við Mitsubishi Motors, um at keypa 34% av av fyritøkuni.

**Kelda: BIL**

## Hvør sína helvt í NedCar

Mitsubishi Motors og Daimler-Chrysler eiga nú hvør sína helvt í hollandsku NedCar bilaverksmiðjuni, sum ger m. a. Mitsubishi Carisma og Volvo S/V40.

**Kelda: BIL**




## Saab 9-5 frítíðarbilur

Eftir at Volvo V70 XC og Audi A6 Allroad eru komnir á marknaðin, hevur Saab tikið avgerð um at gera ein líknandi 9-5 frítíðbil.

**Kelda: Bilen Motor & Sport**



# Peugeot 607 til danska umhvørvis og orkumálaráðharran

*Magnus Gunnarsson*

Nú verður skjótt eitt ár síðan Peugeot 607 alment varð vístur fram á altjóða bilaframsýningini í Frankfurt í september í fjør. Bilurin koyrir í eitt nú heimlandinum hjá Peugeot, Fraklandi, og kemur á danska og føroyska marknaðin í heyst.

### Stórur, ljóðleysur og rúmligur

Peugeot 607 er ein stórur, snøggur og rúmligur bilur, ið er ein sonn fragd at koyra. Hann er so ljóðleysur, at tey, sum sita aftan og framman kunnu kunnu lættliga tosa saman, tá koyrt verður við nógvari ferð.

Av trygdarútgerð er millum annað 6 airbags, harav tvær eru sum rullumadrassur, ið blásast upp og verja høvdið við ein síðusamanstoyt.

ABS bremsurnar hava elektroniskan bremsukraftfordeilara, eins og antispin (ARS) og elektroniskan stabilitetskontrol (EPS). Peugeot 607 verður framleiddur eftir einari nýggjari skipan, ið gevur kundanum møguleikar fyri at fáa bilin uppbygdan eftir egnum ynski.

### High Density Injection

Bilurin er sera væl útgjørdur, og standard útgerðin er m. a. klimaanlegg við mikrofiltri, ið kann regulerast til tey, sum sita í høgru ella vinstru síðu. Eisini hevur hann fartpilot, koyriteldu og






regnsensorar, ið automatiskt seta viskararnar í gongd, tá tað regnar á forrútin.

Umframt el-rútar og elspegl við varma, kann viðførisrúmið lætast upp elektriskt ella uttanífrá, við knøttinum, ið situr í nullinum á 607 embleminum aftan.

Møguleiki er at velja ímillum tríggjar motorar, ein 2.2 litur bensinmotor við 160 hk, ein 3.0 litur V6 við 210 hk, og tann nógv umtalaða 2.2 litur HDI (High Density Injection) common rail dieselmotorin við 133 hk og tí nýggja framkomna filtrinum, ið við eini eyka forbrenning reinsar teir smáu sótmolarnar burtur.

### Bílagt 607 sum ráðharrabil

Danski umhvørvis- og orkumálaráðharrin, Svend Auken, vil ganga undan sum eitt gott fyridømi, og hevur saman við bilførara sínum bílagt ein metalgráan Peugeot 607 HDI.

Auken verður argaður av øðrum politikarum fyri at koyra við stórum bensinslúkara, ið dálkar umhvørvið. Hann sigur millum annað við Politiken:

– Hvis branchen kommer med en god løsning, så viser jeg den gerne frem!

Eisini gleðir hann seg yvir, at hann við nýgga ráðharrabilinum fer at koyra næstan dupult so langt uppá liturin, og at dálkingin verður so lítil sum til ber.

**Keldur: FDM / Motor & Peugeot Danmark, Presseafdelingen**

# Treytað frádøming nakað nýtt í ferðslulógini

Nakað heilt nýtt í ferðslulógini er treytað frádøming av koyrikortinum í sambandi við fyrstuferðarbrot undir serliga linnandi umstøðum. Hetta merkir í stuttum, at lógbrótarin fær bót og ein treytaðan dóm í ávísa tíð. Brýtur hann lógina aftur í hesum tíðarskeiði í so stóran mun, at nýggja brotið minst gevur sama dóm, so fellur hamarin harðliga, tí endurtøkuavleiðingarnar eru, at bæði upprunaligi og nýggi tilburðurin verða lagdir sum grund undir treytaleysari frádøming. Treytað frádøming verður bert brúkt undir heilt serliga linnandi umstøðum, og tað verður upp til dómsvaldið at leggja støðið í tílíkum málum.



gult cyan magenta svart

# út at koyra

# Longsti undirsjóvartunnil til bilaferðslu í Europa

*Magnus Gunnarsson*

Um vit hyggja í Norrakortið, síggja vit, at strekkið frá Bergen til Stavanger sær so trupult út, av tí at høvuðsvegurin, E39, verður avbrotin av ferjusambondum í trimum støðum.

Næsta ár verður lættari hjá teimum, sum ætla sær at koyra hendan vegin, tí tá verður eitt ferjusamband minni.

### 260 metrar undir havyvirflatuna

Oyggjarnar Stord og Bømlo verða samanbundnar við tveimum heingibrúgvum, einari stoyptari brúgv og einum undirsjóvartunnli, sum verður gjørdur inn á fastlandið, nakað norðan fyri Haugesund.

Tunnilin verður 7.831 metrar langur og sostatt longsti undirsjóvartunnil til bilaferðslu í Europa. Lægsta punktið í tunnlinum verður 260 metrar undir havyvirflatuni. Hesar oyggjarnar við sínum 30.000 íbúgvum eru í dag, stórsta oyggjasamfelag í Norra, sum ikki hevur vegasamband til fastlandið. Hetta hevur við sær, at fýra ferjusambond verða niðurløgd. Til sammeting kunnu vit nevna, at tunnilin um Vestmannasund eftir ætlan verður umleið 4.900 metrar langur og lægsta punktið um 105 metrar undir vatnyvirflatuni.

»Trekantsambandet«, sum verkætlanin verður kallað, varð samtykt í Stórtinginum í 1996, og byrjað varð á vári 1997. Byggitíðin bleiv mett til fýra ár, og prísurin verður umleið 1.8 milliardir norskar krónur. Statens Vegvesen Hordaland, ið er byggiharri, stendur fyri verkætlanini og hevur eftirlitið við arbeiðinum. Sjálvt arbeiðið verður gjørt av Statens Vegvesen og boðið út til aðrar entreprenørar.

### Skjótari enn væntað

Arbeiðið við undirsjóvartunnilinum hevur gingið væl, og komið var ígjøgnum eitt hálvt ár fyrr enn væntað. Arbeitt varð báðumegin frá, og teir møttust undir havinum í september mánað í fjør, og holini raktu beint á hvørt annað.

Koyribreytirnar til heingibrúgvarnar verða gjørdar í Hollandi og Italia. Hvørt element vigar 125 tons, og verða tey førd á stórum prámum, sum verða sleipaðir til Noregs, har ein flótikrani heingir koyribreytirnar uppá pláss.

Roknað verður við eini øking í ferðsluni uppá eini 30%, og at umleið 4.000 bilar fara at brúka fasta sambandið um samdøgri.

### Størsta verkætlan aftaná Gardermoen

Statens Vegvesen samstarvar við Sunnhordaland Bru og Tunnelselskap A/S um fíggingina, og koma teir at standa fyri innkrevjingini av bummpengunum. Hetta er stórsta verkætlan í Norra aftaná Gardermoen lufthavnina.

Stutt norðan fyri Stavanger eru tveir undirsjóvartunnlar, sum eru væl upplýstir og sera tryggir at koyra í. Tað er lítið øðrvísi enn at koyra í einum vanligum nútímans tunnli. Um tann komandi tunnilin um Vestmannasund verður á slíkum støði, hava tey, sum ikki unnast við tankan um at koyra undir sjónum, onki at óttast fyri.

**Keldur: Statens Vegvesen & Bømlo Nyt**







*Brúgvarnar samanbinda oyggjarnar Stord, Føyno, Nautøy, Spissøy og Bømlo. Undirsjóvartunnilin gongur frá Føyno til Sveio, nakað norðanfyri Haugesund. Tunnilin fer undir oynna Otterøya*



Tunnelen er ferdig driven

Gjennomslaget vart markert 2. sept. eit halvår tidlegare enn planlagt. Vegsjef, fylkesvaraordførar, ordførarane i Bømlo, Fitjar, Stord og Sveio, og styreformannen i Sunnhordaland Bru og Tunnelselskap helsa tunneldrivarane med vel utført arbeid.

Statens vegvesen tunnelseksjonen har drive frå Sveiosida og AF Trekant tunnel som har drive frå Føynostuffen, er begge nøgde med framdrifta. Dei traff kvarandre under havet omtrent på centimeteren.

240.000 arbeidstimar er gått med utan alvorlege uhell. Ferdiggjering av kjørebane, grøfting, vannsikring, ventilasjon og elektriske installasjonar står att.

Lys i tunnelen.

Blomar til tunneldrivarane.